# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019



## SPURDÓMUR: HVØRJA FARVU HEVUR EITT SPEGL?



Granskarar: 5.Flokkur í Sands skúla

# INNGANGUR

Vit hava arbeitt við at finna út av hvørja farvu eitt spegl er, vit hava leita á googla/youtube og spurt foreldrini um nakar ger spegl í Føroyum. Vit gjørdu eisini royndir við myndatóli og ljósi og spegli. Vit hava eisini gjørt samrøður við lærara og starvsfólk á Atlanticpane. Hetta er sera áhugavert, men eisini torført.

Lærari: Fríðgerð Selfoss

Navn, teldupostur

Luttakarar: Ata, Vár, Sissal, Jákup Andrias, Demmus Rói, Sandra, Martin, Brandur, Kjartan, Rúna, Andrea og Elsi

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

Okkara hypostsur

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

Fylgiskjal nr 1: Samrøða við Kristian Højsted lærari

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á hvat fyri farvu eitt spegl hevur?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit gjørdu okkum nakrar tankar um hvat vit hildu tað var.

- Summi halda at eitt spegl er gjøgnumskygt
- Summi haldi tað er allar farvur
- Summi halda at eitt spegl er glas, sum vísur allar farvur og tað líkist sum tað er silvur og tað eru fleiri sløg av speglum, men um vit hyggja í eitt spegl sýggja vit allar farvur

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Tað fyrsta sum vit ætlaðu var at finna út av um nakar í Føroyum ger spegl. Fyri at finna ut av tí fara vit heima spyrja foreldur ella onkran sum vit kenna m tey vita um onkur í Føroyum ge r spegl.

Vit settum eisini fyri at leita á google og youtube eftur hvørjar farvur eru í einum spegli.

Vit ætlaðu eisini at finna so nógv spegl og ting sum man kann spegla sær í og

vita um vit sóu nakra ávísa farvu.

Eisini  fara vit at spyrja ein alisfrøðislærara Kristian Højsted nakrar spurningar um hetta.

# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Vit fóru fyrst heim at spyrja foreldruni um tey vistu nakran sum gjørdi spegl í føroyum og ein pápi segði Atlantic pane kanska gjørdi spegl so vit ringdu til Atlantic pane og spurdu um tey gjørdu spegl. Tey søgdu nei, men tey søgdu at tað var okkurt í jarninum sum ger spegli grønt.  Tey søgdu at fyrst er tað ein glaspláta og so leggur tú eitt slag av filmi á baki á glasinum so blívur tað til eitt spegl. Spegl eru at sindur grønlig, tí jarn er í glasinum, sum man hevur gjørt spegli úr. Spegl er tað sama sum glas tí tú leggur bara filmin á tað, so kann man eisini leggja eitt annað slag av filmi á so um tað brotnar hongur tað saman, tað er trygdarspegl. Ofta er tað stovnar sum hava spegl við trygdar filmi á.



Vit hava googla og verið á youtube og har funnu vit eisini fram til at tað var grønt ein grønur litur, ið kom til sjóndar.

Vit fóru eisini at taka myndir av speglum og tingum, sum man kann spegla sær í og vita um vit sóu nakra farvu og nær og hvar kann man spegla sær.









Meðan vit tóku myndirnar sóu vit nógvar farvur og ikki so nógvar farvur, men meðan vit tóku myndirnar sóu vit at um man hugdi inn á síðina á speglinum sást hesin grøni liturin tey á Atlantic pane tosaðu um.



Vit gjørdu vit eina aðra roynd eisini. Fyrst so fóru vit inn á wc. Vit fóru yvir til eitt spegl og so koyrdu vit hurðina heilt upp so at so nógv ljós kom inn sum møguligt og tóku mynd so koyrdu vit hurðina longur og longur aftur og tóku myndir so hvørt og til endans heilt aftur. Hetta gjørdu vit fyri at vita hvat vit sóu. Vit funnu út av at minni og minni ljós var til staðar minni og minni sóu vit og færri og færri farvur.






Vit funnu út av at fyri at kunnu spegla sær mugu vit hava ljós.

Vit spurdu eisini ein gamlan alisfrøðis- og roknilærara Kristian Højsted nakrar spurningar. Hann fortaldi um gjøgnumskygd spegl. Til dømis gjøgnumskygd spegl sum man brúkar í rokning og so eisini hjá politinum. Sí fylgiskjal.



# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til at spegl kunnu gott vera gjøgnumskygt. Heima við hús er tað ikki normalt at hava gjøgnumskygt spegl men t.d. hjá løgregluni brúkar man ofta gjøgnumskygt spegl og tey brúkar man eisini í rokning.

Vit hava funnið út av at spegl fyrst er ein glaspláta og so leggur tú eitt slag av filmi á baki á glasinum so blívur tað til eitt spegl. Spegl eru at sindur grønlig, tí jarn er í glasinum, sum man hevur gjørt spegli úr.

Fyri at eitt spegl skal virka, má ljós vera til steðar, tí tað er ljósi sum verður kasta aftur og so síggja vit farvurnar.

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit fara at gera eina framløgu við powerpoint og fortelja hinum børnunum í skúlanum tá vit hava morgunsang. Eisini ætla vit at ganga runt vit einum lítlum spegli og spyrja fólk um tey vita hvørja farvur eitt spegl hevur. Tá tey hava sagt sína hugsan, fortelja vit teimum, um hvat vit hava funnið út av.

# FYLGISKJØL

1.

## Spurningar til Kristian Højsted

1. Er eitt spegl gjøgnumskygt?

   Ja í rokning brúka vit spegl.
   T.D. hjá løgregluni brúka teir spegl, sum síggast kann ígjøgnum.
   Heima við hús er vanligt ikki at síggjast ígjøgnum.
   Sony hevur gjørt eitt gjøgnumskygt spegl.

2. Er eitt spegl silvur og glas?

   Ja, men eisini eitt tunt lag, av aluminium – ella onnur metallir
   sum eru løgd á eina glas plátu. Vatn kann virka sum spegl. O. M. A.

3. Eru allir litir í einum spegli?

   Ja, men eg skilji ikki ordiliga spurningin. Meina tit um liturin verður kastaður aftur?

   Newton visti.